


*Nr. 11* *28. mai 2017* *77. árg.*

# Tann livandi vónin

Ein dag kemur Kristus aftur. Hann kemur aftur í dýrd og veldi, við himmalsins herskarum, og ongin er førur fyri at standa móti veldi hasara. Á, hvør vón, vit trúgvandi hava.

Tú spyrt: „Hvat skal eg gera, at eg kann vera vísur í at sleppa við?“ Fyri tað fyrsta mást tú venda tær burtur frá tíni synd. Orðið „venda um“ merkir at broyta seg. Tú mást siga við Gud: „Eg havi syndað, og tað pínir meg; eg eri sinnaður at broyta allan mín lívshátt.“

Vit mugu trúgva. Trýrt tú? Tú sigur: „Víst trúgvi eg. Eg eri við í meinigheitini, og eg trúgvi á Gud og Kristus og...“ Tað er ikki tað, orðið „at trúgva“ merkir. Orðið „trúgva“ merkir, at tú fult og heilt yvirgevur teg til Jesus Kristus sum tín Harra og Frelsara. Tú letur hann koma inn í hjarta títt. Tú hevur eitt persónligt samfelag við hann við at lesa í Orði Hansara, og biðja og vitna fyri øðrum.

Tú mást vera sinnaður frá hesi løtu at vera honum lýðin. Tú stendur andlit til andlits við Kristus, sum elskar teg, sum doyði á krossinum fyri teg, sum kann fyrigeva tær, og sum kann frelsa teg. Hann kann geva tær nýtt lívsinnihald og eitt mál at stevna ímóti.

*Jesus kæri før tú meg,*
*hagar ódn ei finnur veg!*
*Før mítt lítla far um hav*
*til tað land, tú frelstum gav!*
*Mót tess strondum líti eg,*
*– Jesus kæri, før tú meg!*

# Sálarlæknin gevur ráð

Dr. Med. Smiley Blanton er sálarlækni og ein ómetaliga klókur maður. Her sigur hann okkum frá nøkrum, hann upplivdi:

Tann nýggi sjúklingurin gav sær far um, at eg hevði eina Bíbliu liggjandi á skriviborðinum.

„Tygum siga mær ikki, at tygum lesa Bíbliuna, tygum, sum eru sálarlækni?“ segði hann bilsin.'

„Eg eri ikki nøgdur við bara at lesa hana,“ svaraði eg. „Eg granski hana. Bíblian er besta bókin í menniskjansligum atburði, sum nakrantíð er skrivað. Um fólk av sonnum vóru før fyri at grípa um boðskap hennara, kundu mangir av okkum sálarlæknum bara stongt skrivstovuna og farið til útróðrar.

Lat meg nevna nøkur av teimum skriftstøðum, sum hava givið mær mest.

**„Her niðri eru hinir ævigu armar.“** (5. Mós. 33,27) Í øldir hava menniskju í neyð og tvørleikum funnið ugga í hesum orðum úr 5. Mós. Og tað er rímiligt. Ein av óttunum, sum vit eru fødd við, er óttin fyri at detta. Tí er tankin um einar kærleiksfullar armar, sum altíð eru til reiðar at halda okkum uppi, svarið upp á tann tørvin, sum vit øll hava, fyri at vit kunnu kenna okkum trygg og finna vernd. Annars er tað at nema við onkran tann sterkasti formur fyri samband. Tí gevur henda bíbilska myndin eina kenslu av djúpum friði. Um tú ert plágaður av strongd og svøvnloysi, átti tú at roynt at endurtikið hesi orðini fyri tær sjálvum, tá ið tú leggur teg at sova. Tað kann væl vísa seg at vera úrslitabetri enn sovitablettir.

Vit sálarlæknar ávara móti innibyrgdum illsinni og hatri. Vit vita, at óloystar ósemjur kunnu gera okkum likamliga sjúk. Hvussu verður hetta sagt í Bíbliuni?

**„Latið ikki sólina seta yvir vreiði tykkara.“** (Ef. 4,26 V.D.) Og **„Glatt hjarta gevur heilsubót góða.“** (Orðt. 17,22) – Nettupp!

Tað er eingin endi á øllum teimum sannleikum, vit finna her … í einari bók, sum í 3.000 ár hevur verið ein hjálp í neyðini hjá øllum teimum, sum vóru nóg klók at søkja sær hjálp úr henni.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus grætur

*Og tá ið hann kom nærri og sá staðin, græt hann um hann.*
*Luk.19,41–44.*

Langt burtur frá tykjast allir lutir og mong menniskju vøkur og góð. Men nærri tú kemur, meira broytist myndin, og kemur tú heilt nær, gerst alt eitt satt vónbrot. Onkur hevur sagt, at tað eru bara standmyndir, sum gerast størri, nærri tú kemur teimum.

Langt burtur frá var savningarstaður jødanna, Jerusalem, tempulstaðurin, hin heilagi staðurin. Men tá ið Jesus kom nærri og sá staðin, græt hann um hann. Hesin tignarligi staðurin, sum átrúnaðarliga sæð var stirnaður í fariseara-stevnu og sjálvrættvísi, skilti ikki sjálvur synd sína, vitjanartíð sína. Hann skilti heldur ikki Guds náði og fyrigeving, sum í miklum kærleika varð boðin honum í Jesusi Kristi.

Tá ið Jesus kom nærri, græt hann. Jesus græt ikki so nógv um sjálva syndina, men um, at staðurin skilti ikki syndina. Honum tørvaði ikki frið hansara, tók ikki ímóti náði hansara – fólkinum tørvaði hann ikki!

Tá ið Jesus kom nærri, græt hann. Men Jesus kemur eisini nærri tær .... sær hann teg tá gráta ella gleðast?

*t.*/ týddi.

---

Vit eru her í Kristi stað og hansara vegna. Tískil mugu vit ikki bera okkum at sum illsintir og argir krígsmenn, men sum glaðir umboðsmenn. Verðin er sjúk og móð av kríggi, harðskapi, yvirgangi, fátækdømi, órættvísi og moralskari afturgongd. Jesus hevur goldið fyri allar heimsins syndir, og okkara lutur er at siga menniskjum tað.

*e. c.* ums.

---

Heðin Brú: Ger sum vit, siga fjøllini. Legg skuggarnar niður við tínar føtur og reis teg upp í ljósið. – Við øðrum orðum: Star teg ikki blindan upp á treggar og trupulleikar, men samla uppá og leita eftir tí, sum er ljóst og gott.

*e.c.* ums.

# Hvør sleppur við?

*Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva. Efesus 2,8*

Hann hevði hug at fara upp í onkra meinigheit. Men har hann hevði hugt inn á gólvið, vóru bara nakrir originalar og nøkur yvirandalig menniskju. „Ja, um tú finnur eina fullkomna meinigheit, so sig mær frá. Og tú mást fyri alt í verðini ikki melda teg inn har, tí tú fert kanska at oyðileggja hana," segði ein prestur við hann við einum brosi.

Hetta minnir um søguna um mannin, sum Pætur steðgaði við himmalsins portur og segði við: „Tú hevur logið ov nógv til at kunna sleppa inn higar." „Á, vís miskunn,"svaraði maðurin, „minst til, at einaferð róði tú út."

Hvør kann vera við í eini meinigheit? Hvør sleppur við til himmals? Ikki tey fullkomnu, men tey, sum taka ímóti fyrigevingini av Jesu hond.

*Tá um lívsins bylgjuhav*
*síðsta ódnin ríður av.*
*Tá ið brýtur fyri stavn,*
*tá eg tekki sælu havn,*
*Jesus kæri, styrk tá meg*
*við tí troyst: **„Eg føri teg!"***

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 28. mai | Tekstur: | Jóh. 14,1–3 og Mark. 16, 19–26 og Matt. 24,30–31; | bíbliuorð: | Jóh. 14,2a |
| 4. juni | Tekstur: | Áps. 2,1–18 og Jóh. 14,26–27 | bíbliuorð: | Jóh. 14,26b |
| 11. juni | Tekstur | Áps. 9,1–19; | bíbliuorð | Mark. 16,15c |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 12*** ***11. juni 2017*** ***77. árg.***

# BURTURFORKLÁRING

*Og tá ið teir vóru komnir á fund saman við hinum elstu, hildu teir ráð saman, og teir góvu hermonnunum væl av peningi og søgdu: "Sigið: "Lærusveinar hansara komu á náttartíð og stjólu hann, meðan vit svóvu."" Matt. 28,12–13.*

Kann tað passa, at Jesus reis upp frá deyðum? Har má vera ein forkláring. Soleiðis hava menniskju hugsað líka frá tí degi, tað hendi. Høvuðsprestarnir og teir skriftlærdu gjørdust deyðaræddir, rómversku hermenninir, sum hildu vakt við grøvina, komu og søgdu, hvat ið hent var. Um hetta var satt, var Jesus tann, sum hann segði seg vera, og so høvdu teir gjørt seg sekar í tí versta, sum teir átrúnaðarligu leiðararnir kundu gera: Teir høvdu á grovasta hátt sett seg upp ímóti Guds frelsuætlan.

Hetta mátti ikki vera satt, og tað mátti ikki frættast úti millum fólkið. Tí góvu teir hermonnunum pening fyri at fáa teir at lúgva og siga, at lærusveinarnir høvdu stolið líkið.Teir munnu hava fingið rættiliga nógvan pening, tí tað, teir skuldu siga, var nakað, sum ein rómverskur hermaður aldri kundi góðtaka. Teir kundu vera dømdir til deyða, um teir høvdu sovið, meðan teir hildu vakt. Tí lovaðu prestarnir hermonnunum, at teir skuldu tosa við landshøvdingin, so teir ikki vórðu revsaðir.

Men høvdu teir sovið, hvussu skuldu teir so forklára, at lærusveinarnir kundu rulla steinin frá grøvini, uttan at nakar teirra vaknaði? Og um tað hevði verið møguligt, hvussu hevði nakar so trúð, at teir deyðaræddu lærusveinarnir høvdu dirvi til at gera nakað slíkt? Og um so nøkur forkláring hevði verið, máttu teir eisini komið við eini forkláring uppá, at

lærusveinarnir ídnir boðaðu nakað, sum teir vistu var lygn, og vóru fúsir at fara í deyðan fyri tað.

Tað, sum hermenninir fortaldu, var so órímiligt, at ongin trúði tí. Lærusveinarnir vóru sannførdir um, at Jesus livdi, og at teir høvdu hitt hann. Einasta forkláringin, sum heldur, er rætt og slætt, **at Jesus veruliga reis upp frá deyðum.**

# Hvat hevur virði?

Asbjørn Kvalbein helt eina andakt á Visjon Norge og segði nakað soleiðis:

Uttan fyri eitt hotell í Glasgow í Skotlandi var ein mannamúgva savnað. Har hoyrdust larmur og fagnaðarróp. Fólk heiðraðu eitt fótbóltslið, sum júst hevði spælt ein avgerandi dyst.

Eingin gav sær far um ein lítlan og klæntrasligan mann, sum smeyg sær inn um dyrnar á hotellinum, og eingin heiðraði hann. Kortini hevði hann hetta síðsta árið bjargað fleiri hundrað menniskjum, og síðani tá hevur hann bjargað fólki í túsundatali. Hetta var Alexander Fleming, maðurin, sum uppfann penicillinið. Fyri hansara tíð doyðu fólk av lungnabruna og øðrum sjúkum, sum í dag fæst heilivágur fyri.

Tað er sanniliga munur á at heiðra nakrar menn, sum renna runt á einum vølli eftir einum bólti, og so at heiðra mannin, sum bjargaði mannalívum í rúgvutali. Men sama myndin endurtekur seg, tá ið vit hugsa um Jesus. Fólk mugu fáa síni eygu upp fyri, hvat ið hevur virði, ikki bara ein løtuvinning, men varandi virði. Jesus hevur betalt ein ovurhonds prís fyri at bjarga allari mannaættini heim í dýrdarríkið. Mong ganga gjøgnum lívið og hyggja bert niðureftir, niður á hetta verðsliga. Summi hevja eyguni uppeftir og síggja Jesus doyggja á krossinum fyri tey. Tey taka í trúgv ímóti ofrinum og siga TAKK og heiðra hann í hjarta sínum. Men Jesus doyði fyri øll, ikki bara fyri nøkur fá ella tey, sum eru so „góð“. Ofrið er fullkomið og skal takast ímóti í trúgv. Eingin annar kann geva tær eitt slíkt tilboð sum Jesus, tí tað hevur varandi virði. Eg vil viðmæla øllum mínum landsmonnum at taka ímóti Jesusi.

*Effie Campbell.*

# Hann, sum var!

*Náði og friður veri við tykkum og friður frá honum, sum er, og sum var, og sum kemur. Opb. 1,4.*

Tann Gud, sum er, tað var eisini hann, sum var. Fortíðar Gud er nútíðar Harri. Tað var Gud, sum í forðum skilti havsins bylgjur, slættaði veg ígjøgnum oyðimørkina, læt vatn vella úr klettinum og læt sandlendið gerast ein blómandi urtagarður.

Tann Gud, sum var, hann loysti okkum úr øllum syndum okkara. Alla menningina læt hann bera fram ímóti hini stóru sáttargerðini, hinum fullgjørda verkinum á Golgata. Vit vórðu keypt leys frá synd og deyða, vit komu inn í tað ríkið, har syndanna fyrigeving og halgan eru. Gud, sum var, hevur gjørt okkum til eitt kongaríki og til prestar. Tað kongadømið, hann stovnaði, kom ikki við harðskapi og kúgan.

Kristi ríki er ein heimsumfevnandi bróðurskapur, har tað ikki er trælur ella frælsur, maður ella kvinna, jødi ella grikki. Í Kristi varð allur ættarmunur, allar ættarskipanir og tjóðarmørk sett úr gildi, og soleiðis er dagin í dag. Hetta boðið skulu vit vera við at bera um allan heimin sum gleðitíðindi til øll mannabørn. Náði og friður frá honum, sum var!

*t.*/ týddi.

---

Áðrenn Jesus rópti Lázarus aftur til lívs, hugdi hann upp móti himli og segði: „ ... Faðir, eg takki tær, av tí at tú hevur hoyrt meg.“ Jóh. 11,41. Nakað undranarvert hendir, tá ið tú frammanundan takkar Gudi, at hann frelsir teg, verjir teg og hevur umsorgan fyri tær. Trúgvin lyftir seg upp, og tú fært dirvi at bjóða tí, sum tú fyrr helt, var deytt, aftur til lívs.

*e.c.* ums.

---

Tað, sum í føroysku útgávuni av Nýggja Testamenti eitur „frelsa“, eitur á grikskum sozo. Hetta orðið kemur 120 ferðir fyri í N.T. í 103 ymsum versum, og tað merkir nógv meira enn bara „frelsa“. Tað merkir: 1. heilsa 2. grøddur 3. gjørdur heilur 4. útfríaður 5. varðveittur 6. frelstur.

*e.c.* ums.

# At vera fornoyðaður

Ein originalur segði tað soleiðis: „Mangan halda vit, at grasið er grønari hinumegin stikið," og so skoytti hann uppí: „Um so er, stavar tað frá, at har hevur verið gjørt meira av at væta."

Summi nýta nógva tíð til at ganga og droyma: „Hugsa tær, um eg hevði átt handa bilin, hasa íbúðina, handa bátin, havt hasa gentuna, sloppið handa túrin uttanlendis o. s. fr.?" Men útreiðslurnar kundu lættliga gjørst væl størri, enn tú hevði væntað. Hví skulu vit halda, at hini eru so múgvandi og liva eitt sorgleyst lív"

Av tí, sum Paulus skrivar í Nýggja Testamenti, kunnu vit læra at vera nøgd, ella sum tey gomlu søgdu: **at vera fornoyðaði.** Paulus sat í fangahúsi, men hann hevði vant seg til altíð at seta Kristus fremst í lívi sínum. Tá kundi hann gleðast undir øllum umstøðum. Hann skrivar soleiðis til tey kristnu í Filippi: *„Eg dugi at vera í smáum korum, og eg dugi eisini at hava almikið; í øllum viðurskiftum og í øllum lutum havi eg lært tað loyndarmál bæði at vera mettur og at vera svangur, bæði at hava almikið og at hava trot.* ***Eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan."*** *Fil.4,12–13*

---

Skrivað stendur í Orðt. 11,11, at bønirnar hjá gudsóttandi fólkum fáa býin at blóma. So latið okkum vera trúføst í bønini fyri landi okkara og øllum býum og bygdum, so at Gud verjir okkum. Latið okkum biðja: „Leið okkum ikki í freistingar - men frels okkum frá tí illa!"

e.c. ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 11. juni | Tekstur: Áps. 9,1–19; | bíbliuorð: Mark.16,15c |
| 18. juni | Tekstur: Áps. 16,6–10 + 16–34; | bíbliuorð: Jes. 45,2a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74